tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 132 Fríggjadagur 12. juli 1996 70. árgangur Krónur 7,00

*Bretsk kanning ropar varskó:*

## Dounreay fer at leka geislavirkið burturkast

*Ein goymsla við geislavirknum burturkasti á Dounreay kjarnorkuverkinum í Skotlandi kann fara at leka út í havið, verður hon ikki umvæld*

Síða 7

*B68 móti Werder Bremen:*

## Vit fáa okkara sak fyri




*- Vit møta einum liði á høgum støði, allir spælararnir hava verið á landsliðum, og tað er í grundini ótrúligt, at eitt slíkt lið skal vera við í Intertoto, sigur Christian Tranberg, venjari hjá B68*

Síða 8

VIT KOYRA ALT SLAG AV
VØRUKOYRING
FLYTING ÚR FØROYUM TIL FØROYA
VIT HAVA FLYTIKASSAR, GOYMSLU OG KAPPINGARFØRAR PRÍSIR
O.A. VØRU-KOYRING
17727 · 88727
TILBOD VERÐA GIVIN

**Eru nú farnir til verka í Lopra:**

# Fyrireikað upp á tað ringasta

Mikudagurin var ein stórur dagur í Føroya søgu. Tá var almenna byrjanin til fyrstu boriætlanina við atliti til ein komandi oljuvinnu í Føroyum. Tað eru garvaðir menn, sum standa á odda fyri arbeiðinum, og teir vænta sær onga r trupulleikar. Men kortini er trygdin sett í hásæti, sum altíð í oljuvinnuni, og teir eru fyrireikaðir upp á tað ringasta, bæði oljulekar, eld, sjúku, herverk og aðrar vandar.

Síðurnar 4-5-6



## Heldur Axel Tórgarð enn Baywatch og Beverly Hills

**Verður okkara mál væl ment, og halda vit tað búgvið, fáa vit betri skaldskap, betri fjølmiðlar og betri skúlar. Vit fara inn á sjálvstyrkjandi nýggjar ræsur, og burtur úr tí fer at grógva størri sjálvsvirðing, sigur Jonhard Mikkelsen, sum eisini heldur, at loftmiðlarnir eiga at geva mentanini eins góða rúmd, sum ítrótturin fær.**

*Nú er at hava tunguna mitt í munninum:*

# - Vit hopa, at vit koma nóg langt niður

*- Vit vita øll, at óvissan er stór. Men koma vit ikki undir basaltið, er boringin langt í frá misevdnað kortini.*



*Arne Bruvoll greiðir frá boringini í Lopra. Arbeiðið kostar 28 milliónir. Nakrar milliónir liggja eftir í Føroyum, men tað er ikki nú, pengarnir skulu forvinnast, siga teir*

ÁKI BERTHOLDSEN

ÁKI HERMANSSEN

Tað hevði verið fantastiskt at komið undir basaltið og funnið jarðløg, sum geva okkum greiðari ábendingar um at olja er í føroysku undirgrundini og eggjar okkum til at halda fram.

Men evnast tað ikki at koma undir basaltið, er boringin ikki misevdnað kortini, tí vit fáa í øllum førum nógvar upplýsingar um føroysku undirgrundina, sum vit ikki høvdu frammanundan og sum geva okkum nógv betri grundarlag at arbeiða víðari útifrá.

Boringin, sum nú hevur sett Lopra mitt á Føroyakortið, er ikki ein oljuboring.

Hon er ein vísindalig kanningarboring, sum verður grundarlagið undir framhaldandi virkseminum undir Føroyum.

Hon er eitt framhald av boringini, sum var í Lopra í 1981, tá ið borað varð 2178 metrar niður.

Hesuferð er ætlanin at bora góðar 1300 metrar niður afturat, niður á 3500 metrar.

Seismisku kanningarnar, sum eru gjørdar seinastu árini, vísa, at brotlingar eru í undirgrundini longur niðri.

Brotlingar eru á 2400 metrum og aftur á millum 3300 og 3500 metrum.

Men tað er sera trupult at tolka seismiskar mátingar í basaltinum og tí er ætlanin, at boringin skal geva svarið, men hvørji svarini verða, kann eingin siga nú.

Tað, vit vóna er sjálvandi at koma undir basaltið og at finna jarðløg har, sum eggjar til framhaldandi virksemi í oljuvinnuni, sigur Martin Heinesen, jarðfrøðingur og leiðari á oljufyrisitingini.

– Øll oljufeløgini vita at tað er stórur vandi fyri at vit ikki koma undir basaltið, men vit fáa í øllum førum virðismiklar upplýsingar um undirgrundina, sigur Arne Rosenkrands Larsen, projektleiðari.

Tá ið borað varð fyrru ferð í Lopra í 1981, funnu tey tekin um gass í undirgrundini.

Tað tóktist sum um gassið kom í borholið heilt niðri á botni. Tað var eisini olju at finna á vatninum, sum setti úr borholinum. Hóast olja varð brúkt at loysa boran, tóktist oljuhinnan at koma onkra aðrastaðni frá.

Men hvat hetta merkir, er ilt at siga nú.

Í hvussu so er, er møguleikin fyri at koma niður á olju nú, næstan = 0.

## Áhugin kyknaði

Eftir at holið í Lopra varð borað í 1981, hoyrdist lítið og einki til, at nakað meira skuldi henda.

Men síðani fekk danska felagið DONG aftur áhuga fyri føroysku undirgrundini og í 1992, settu teir seg í samband við føroysku myndugleikar.

Samband hevur verið ímillum DONG og føroysku myndugleikar alla tíðina og í fjør kom tað so langt, at oljufyrisitingin bjóðaði oljuvinnuni at fíggja og standa fyri eini ætlan um at bora longur niður í Lopra.

DONG fekk til uppgávu at standa fyri ætlanini og síðani eru 19 oljufeløg komin uppí sum sponsorar.

## 28 milliónir og so er liðugt

Treytirnar í sovorðnum arbeiðið eru harðar.

Ætlanin kostar 28 milliónir og tá ið tær eru brúktar verður borin sløktur og tikin niður.

So er líka mikið, hvussu langt niður teir eru komnir.

Tvs. at gongur boringin seinni enn ætlað, er vandi fyri, at arbeiðið heldur uppat í hálvum gekki, tí tað verður ikki góðtikið, at farið verið út um fíggjarætlanina.

Soleiðis eru treytirnar í oljuvinnuni.

## Byrjað um eina viku

Í gjár ella í dag tóknaðu teir við at vera liðnir at seta útgerðina upp í Lopra, men tað verður ikki klárt at bora fyrrenn um eina viku.

Tað fyrsta at gera, er at reinsa holið, sum longu er borað. Tað skal eisini fóðrast heilt niður á botn at styrkja veggirnar. Og harafturat skulu ymsar mátingar gerast í holinum, áðrenn farið verður at bora.

Royndir verða alla tíðina tiknar úr borholinum.

Borað verður uppá tann mátan, at grótið verður knúst og ein serlig blanding av flótandi móru og ymsum øðrum verður látið í holið og og tað knústa grótið flótnar upp.

Einar fýra, fimm ferðir verður borin skiftur út við eitt annað slag, sum kann bora eina heila kjarnu uppá nakrar fáar metrar úr holinum og taka tær upp.

Borikjarnurnar og royndir av tilfarinum annars, verður sendar til Danmarkar at verða kannað á jarðfrøðistovninum Geus, sum jarðfrøðisavnið hevur samstarv við.

Jarðfrøðisavnið og tey 19 oljufeløgini, sum betala arbeiðið, fáa øll kanningarúrslitini.

Mátingarnar, sum annars verða gjørdar, verða fluttar elektroniskt á eina miðstøð í London og haðani til oljufeløgini. Jarðfrøðissavnið fær eisini tey úrslitini.



*Bortornið er 60 metrar høgt og kennur at standa klárt á nethinnuni á fólki langt eftir, at tað er tikið niður*

*Boritornið er hansara kongaríki:*

# Væntar ongar trupulleikar



Samskiparin Petur Dahl Nolsøe um prátar við stjóran á boriplássinum, amerikanaran Larry Kidd, sum hevur 40 ár á baki í oljuvinnuni

ÁKI BERTHOLDSEN
ÁKI HERMANSEN

Danskarin Frede Torpe hevur ein týðandi leiklut í boringini í Lopra. Hann er stjóri á boritorninum. Boritornið er hansara kongaríki. Tað er hann, sum stendur fyri sjálvari boringini.

Og tað er ikki harra hvør sum helst í oljuvinnuni, sum í hesum døgum gongur og herskar og regerar á boritorninum suðuri í Lopra.

Frede Torpe er ein gomul rotta í vinnuni.

Hann hevur borað í 33 ár og veit, hvat hann tosar um.

Hansara fyrsta uppgáva var í canada í 1963.

Síðani hevur hann borað um allan heimin.

Hann hevur borað í tropunum í Afrika og og hann hevur borað tætt við Norðpolin í Alaska. Hann hevur borað á landi og hann hevur borað á sjónum.

Og uthitini til at skula til Føroyar rækdi hann ikki.

– Hjá mær er hetta bara ein uppgáva afturat í røðini av uppgávum, eg havi havt.

– Men eg má viðganga at tað er kalt at vera í Føroyum, eftir at hava arbeitt í Egyptalandi í fleiri ár, sigur Frede Torpe.

Hvussu nógv hol hann hevur borað, veit hann ikki, men bara í 1994 boraði hann 12 hol. Í miðal man tað verða eitt um mánaðin hvørt ár, sigur hann.

**Væntar ongar trupulleikar**

Hetta er fyrstu ferð Frede Torpe skal bora ígjøgnum basalt.

Men tað væntar hann ikki serligar trupulleikar av.

– Vit vita, at basaltið er hart og at tað tekur tíð. Men hvussu tað er, vita vit ikki, fyrrenn vit hava roynt.

– Tað fer kanska at ganga eitt sindur seinni enn eg eri vanur við, men trupulleikar koma helst ikki at standast av.

Kanska heldur tvørturímóti, tí hann sigur síðurnar í hesum boriholinum eru harðar og tí dettur einki til far úr teimum og seinkar boringini. Tað hendir meiri enn so, tá ið undirgrundin er bleyt.

**Fleirtjóðað arbeiðsplass**

Boriplássið í Lopra er í hesum døgum eitt fleirtjóðað arbeiðspláss.

Her arbeiða danir, skotar, amerikanarar og nakrir føroyingar.

Tilsamans arbeiða 22 mans á boriplássinum. Teir arbeiða alt samdøgurið sjey dagar um vikuna. Arbeitt verður í tveimum vaktum á 12 tímar. Dagvaktin er frá middegi til miðnátt og náttvaktin er frá miðnátt til middags.

Vanliga arbeiða teir í tvær vikur og so hava teir frí í tvær.

Men teir flestu, sum eru í Lopra verða her alla tíðina.

Tað eru lutfalsliga nógvir føroyingar við í arbeiðnum.

Fýra mans av skipasmiðjuni hjálpa til við ymsum fyrifallandi. Teir hava verið á skeið í Danmark, m.a. á einum oljupalli.

Harafturat er ein føroyingur, sum hevur arbeitt fyri Maersk í Esbjerg í nógv ár.

Samskiparin á boriplássinum er føroyingur og hann hevur ein hjálparmann afturat sær.

Mikudagin kundi hann ikki siga, nær sjálvt arebiðið byrjaði.

Men í gjár, ella í dag, skuldi verið klárt at byrja at reinsa holið, heldur hann.

Sjálvur fyrir hann ikki fyri at byrja í dag, um so skuldi verið, hóast tað er pátrúgv, at tað er óeydnað at byrja fríggjadag.

– Eg havi ongantíð havt trupulleikar av pátrúgv. Vit byrja, tá ið vit eru klárir, sigur hann.

**Lítið arbeiði**

Ein annar týðandi maður á boriplássinum er Larry Kidd úr Wyoming í USA.

Maðurin úr Cowboy statinum er stjóri fyri boriplássinum.

Við sínum 40 ára royndum er hann heldur eingin novica í oljuvinnuni.

Hann sigur, at hetta er eitt lítið arbeiðið, afturímóti tí, hann er vanur við.

Og heldur ikki hann væntar sær trupulleikar.

– Sjálvandi kunnu vit aldrin siga aldrin, men fáa vit trupulleikar verður tað óvæntað, sigur hann.



*Frede Torpe er garvaður í oljuvinnuni og hann stýrir tornunum*


»NÁTTÚRU -PENNICILINIÐ«
**PROPOLIS**
fæst nú aftur!

Mong góð evni hava vit fingið frá býflugunum. Eitt hitt mest undrunarverda man tó vera **PROPOLIS** – náttúrunnar virknasta sóttverndar- og lekievni, mangan nevnt **»russiskt pennicilin«**, sum uttan hjáárin av nøkrum slag grøðir allar hugsandi brunar, ið grøðast kunnu, sár inn- sum útvortis, umframt at linna um liðagikt, lungnasjúkur, eksem, høvuverk, vánaligt blóðrensl, scelerosu eins og aðrar heilsubagar.

Eisini tryggjar **PROPOLIS** skynsomum hormonrensli, ið treytar heilsuliga javnvág.

**PROPOLIS** er ikki bert besta lekievni, tá á stendur – men eisini evnið, sum nýtt dagliga, stimbrar og verjir móti virus-, soppa- og øðrum sjúkuagangi

100% náttúruevni | 60 tablettir á 500 mg (til 2 mánaðar) | 160,-

Fæst hjá **NATEN** søla (Føroyar)
v/ Anne Mari Samuelsen

Ordrar verða avgreiddir beinanvegin (verður sent við postkravi)
**Tlf. 18649 · 83649 11644**

# Nú er hann nøgdur við trygdina

*Norskur trygdarstjóri skal tryggja okkara áhugamál í sambandi við eina komandi oljuvinnu. Hansara fyrsta uppgáva var at meta um trygdina í Lopra og tað er hann nøgdur við*

ÁKI BERTHOLDSEN
ÁKI HERMANSEN

Nógv hevur verið sagt og skrivað um, nær boringina í Lopra skuldi.

Men eitt hevur so í øllum førum verið greitt. Hon kundi í hvussu so er ikki byrja fyrrenn hesin maðurin vendi tumlinum upp eftir.

Maðurin er Alex Buvik, hann er norðmaður og serfrøðingur í trygdarmálum í sambandi við oljuvinnuna.

Oljufyrisitingin hevur fingið sær hann til trygdarstjóra nú í sambandi við eina møguliga oljuvinnu í Føroyum.

Boringin í Lopra er hansara fyrsta uppgáva í Føroyum, men vónandi verður hon ikki tann seinasta, tí hann skal arbeiða fyri oljufyrisitingina í fimm ár.

Hann hevur annars havt sína egnu oljuráðgevarafyritøku í Noregi.

Hann hevur verið í Føroyum nakrar ferðir í sambandi við boringina í Lopra, men er nú farin heimaftur at pakka, tí longu seinni í mánaðinum kemur hann til Føroyar at búgva.

**Er nøgdur**

Trygdarspurningurin hevur verið nógv frammi seinastu dagarnar, men alt er nú fingið í rættlag og á veg suður við Teistanum fekk Danop endaliga boriloyvið frá Martini Heinesen á oljufyrisitingini.

Danop hevði gjørt eina tilbúgvingarætlan, sum trygdarstjórin ikki var heilt nøgdur við.

- Eg hevði onkrar viðmerkingar til tilbúgvingarætlanina, men síðani hava vit lagað han til og nú eri eg nøgdur, fortaldi Alex Buvik okkum á borplássinum mikudagin.

**Fyrireika seg væl**

Hann sigur, at borplássið er nú so væl tryggjað, sum man kann krevja.

Útgerðin er í góðum standi og fólkið er væl útbúgvið. Arbeiðsgongdirnar, sum eru fyriskipaðar, eru góðar, eisini arbeiðsgongdirnar í sambandi við møgulig óhapp.

Vandin fyri at óhapp henda er mikroskopiskur, men av tí hann, hann er til staðar, er neyðugt at fyrireikað seg so væl sum gjørligt, um tað óvæntaða kortini skuldi hent.

– Allastaðni, har okkurt verður gjørt, er vandi fyri, at óhapp henda. Vit eru bara menniskju og menniskju mistaka seg. Tí fyrireika vit okkum so væl sum gjørligt, sigur hann.

Teir vandar, sum kunnu taka seg upp, kunnu verða at eiturgass lekur úr holinum.

Olja kann eisini leka úr holinum og dálka náttúruna ella eldur kann koma í tað.

Eldur kann eisini koma í, sum á einum og hvørjum øðrum arbeiðsplássið.

Borin kann eisini blíva í ólagi. Ja teir eru ságar fyrireika seg uppá herverk og sjúku.

M.a. eru eyka brandpumpar fingnar til vega, sum kunnu pumpa sjógv upp úr Ónavík so tey fara ikki at mangla vatn, skuldi nakað hent.

Avtala er eisini fingin við bjargingarfeløg, løgreglu, sjúkrahús og vaktar og Bjargingartænastuna um at veita hjálp, um á stendur.

Og harafturat er avtala gjørd við grannalond okkara um at veita hjálp, so skuldi tað gingið heilt galið, hava vit atgongd til alla bjargingarútgerð í Norðsjónum, sigur Lars Bruvoll, undirstjóri í Danop.

Tann vandin, sum ræðir teir mest, hóast hann mest er á pappírinum, er, um tað hendir eitt, sum á oljumálið nevnist „blow out".

Tað er, um gass ella olja, sum er undir trýsti, tekur at spræna upp úr holinum.

Men tað eru teir eisini fyrireikaðir uppá.

Teir hava „blow out Preventor" í Lopra, ein útgerð, sum forðar fyri at tað sprænir upp í loft.

Tað eru ventilar, sum tola nógv trýst, sum verða settir omaná holið.

**Skal leggja til rættis**

Alex Buvik hevur í sambandi við boringina í Lopra sæð til, at okkara áhugamál verða tryggjað, hvat trygdini viðvíkur. Tvs, at hann hevur sæð til, at trygdin er so sum krevst í arbeiði á hesum slag.

Tað er hon nú so hann fór rólígur heimaftur í gjár at rigga av at flyta til Føroyar.

Mín uppgáva fyri í Føroyum verður at leggja til rættis trygdina.

- Eg skal gera forskriftirnar fyri tilbúgvingina og trygdini í sambandi við møguliga oljuvinnu við Føroyar, sigur hann.

Hann sigur, at tað verður neyðugt at gera slíkar forskriftir útfrá teimum royndum, sum eru gjørdar í Danmark og ikki minst í Noregi.

Hann heldur, at tað er løgtingið, sum eigur at gera hesar forskriftirnar.



*Lars Bruvoll greiðir frá um „blow out" ventilin, sum stendur til reiðar við borholið.*

*Tvey stykki, sum tey høgrumegin, verða sett saman og so verður tað runda aftast í myndini sett omaná.*



*Maðurin høgrumegin verður ringur at koma uttanum í eini møguligari oljuvinnu. Tað er Alex Buvik, sum er trygdarstjóri hjá oljufyrisitingini. Hann sigur, at Lopraboringin er so væl tryggjað, sum hon kann. Maðurin vinstrumegin er Martin Heinesen.*

**Føroyskur dansur
á Ólavsøku
í HOLLYWOOD
N. Finsensgøta 20**